



## Ein trani í Streymnesi

Ein trani hevur verið at sæð í Streymnesi í nakrar dagar. Rodmund á Kelduni fann hann. Trani er reguligur í Føroyum, men teir eru sera fáir í tali. Tranin er ein sera stórur fuglur og hevur eitt flog upp á 220 til 245 cm. Silas K. K. Olofson tók myndir av honum. Trani eitur á latíni Grus grus.

# Bíligu fiskasløgini meira áhugaverd


*Upsi er vorðin eftirspurdur fiskur, nú fólk eru farin at ansa betri eftir pengapunginum*

**Dýraru fiskasløgini sum eitt nú toskur og hýsa eru ikki so attraktiv í fíggjarliga truplum tíðum. Fólk leita sær eftir bíligari fiskavørum, og tað er her, at tey finna upsan, sum eina góða og lutfalsliga bíliga fiskavøru**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað kann ganga skjótt hvønn vegin, ikki minst í vinnuni, og tað er verri enn so alt, tú kanst gjøgnumskoða í góðari tíð.

Um hesa tíðina í fjør sá ógvuliga svart út hjá tí partinum av okkara fiskiflota, sum fiskaði tey bíligari botnfiskasløgini. Oljan var vorðin hundadýr og ísfiskatrolarar, sum mugu brúka nógva olju fyri at fáa fisk, høvdu tað rættiliga trupult.

Nógv var frammi um okkara lemmatrolarar, sum brenna nógva olju. Fleiri vórðu lagdir, men tað vóru eisini eigarar av partrolarum sum hildu, at nú var tíð at gevast, meðan teir enn kundu svara hvørjum sítt.

Í dag – minni enn eitt ár seinni – er vent í holuni, sum vit plaga at siga.

Bunkringaroljan til skipini er vorðin næstan hálva triðju krónu bíligari, enn tá hon var dýrast, upsafiskiskapurin hevur verið góður, og meðan tey dýraru fiskasløgini eru fallin drastiskt í prísi, hevur prísurin á upsa hildið sær væl.

Eitt av feløgunum, sum gjørdi av at leggja tveir ísfiskatrolarar í mai mánaða í fjør, loysir nú skipini aftur.

Tað er P/F Vár, sum eigur Nornagest og Columbus í Vestmanna.



*Øll vilja hava mettuna, men fólk ansa betur eftir, hvat tey keypa í handlum og á marknaðum*

### Viðurkenning

Altjóða fíggjarkreppan hevur rakt víða um heimin og fólk, sum eiga nøkur oyru at ansa eftir, eru farin at ansa betri eftir pengapunginum.

Nógv eru farin at ansa sær í keypi av vørum, men mettuna vilja øll hava. Tí keypa tey tær vørur, sum geva mettuna, men sum ikki kosta tað hvíta úr eygunum.

Dýraru fiskasløgini sum eitt nú toskur og hýsa eru ikki so attraktiv í fíggjarliga truplum tíðum. Fólk leita sær eftir góðum, men bíligari fiskavørum.

Og tað er her, at tey finna upsan, sum eina góða og lutfalsliga bíliga fiskavøru.

Reiðari, sum herfyri var í útlandinum og eitt nú vitjaði í stórari matvøruketu, sigur, at fólk í størri mun enn áður leita sær eftir bíligum fiski.

- Eg skilti á fólki, at nógvir handlar, sum selja vørur, ið ikki eru neyðugar, hava lítið at gera, meðan matvøruhandlarnir framvegis hava nógv viðskiftafólk, sigur hann.

Og tað er júst í matvøruhandlunum, at fólk fara eftir teimum bíligaru fiskavørunum, sum soleiðis verða eftirspurdar og kunnu seljast fyri hampiliga góðan prís.

### Sær væl út

Í vár hevur prísurin á upsa til landingar í Føroyum ligið upp ímóti seks krónum fyri kilo. Fiskiskapurin hevur verið sera góður, og menn hava kent nógvan pening, samstundis sum roknast má við, at skiparaksturin soleiðis eisini hevur verið á góðari leið.

Tá upsin hevur gýtt, sum hann nú hevur, er vanligt, at avreiðingarprísirnir fella nakað, og soleiðis er eisini, nú avreiðingarvirði liggur á umleið 5,40 fyri kilo.

Reiðarar, sum gera partrolarar og lemmatrolarar út, eru tó rímiliga væl nøgdir við gongdina í løtuni, og teir halda, at um prísurin á upsa kanska fellir eini 25 oyru aftrat, verður royndin kortini lønandi, um fiskiskapurin framhaldandi verður nøkulunda góður.

Vanligt er, at upsaprísurin kvinkar uppeftir aftur, tá summarið er farið at halla, og heystið er komið.

Niðurstøðan er, at hjá teimum, sum fiska upsa, er støðan ikki ringast í løtuni.

# Hava undirskrivað nýggjan avrikssáttmála

**Arbeiðið, sum Fiskirannsóknarstovan ger, skal virðismetast, og tað skal kunna síggjast, hvat broytingar í krøvum til stovnin kosta**

SÁTTMÁLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fiskimálaráðið og Fiskirannsóknarstovan hava nú skrivað undir ein nýggjan og sonevndan avrikssáttmála, sum tað verður rópt.

Sambært heimasíðuni hjá Fiskirannsóknarstovuni er hetta fyrsti sáttmáli av slíkum slag millum ein almennan stovn og eitt aðalráð.

Í 2008 arbeiddu Fiskimálaráðið og Fiskirannsóknarstovan saman eftir einum avrikssáttmála, og partarnir eru samdir um, at komið varð á mál við flestu setningum í hesum sáttmála.

### Krøv kosta

Sambært heimasíðuni hava báðir partar tó ynskt broytingar á fleiri økjum, og tí er nýggjur avrikssáttmála millum partarnar ikki undirskrivaður fyrr enn nú.

Sum skilst, verða uppaftur fleiri broytingar gjørdar í sáttmálanum, sum tíðin líður, tí longu nú er semja um fleiri broytingar fyri ár 2010.

Á heimasíðuni hjá Fiskirannsóknarstovuni verður sagt, at dentur serliga skal leggjast á at virðismeta tað arbeiði, sum verður gjørt á Fiskirannsóknarstovuni, soleiðis at til ber at síggja, hvat broytingar í krøvum til stovnin kosta.


*Á myndini handar Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni, Rógva Reinert, aðalstjóra í Fiskimálaráðnum, avrikssáttmálan fyri 2009, sum nú er undirskrivaður*